# Broytingar LKS - Filtur við stjørnuna

Góðu LKS brúkarar

Fleiri broytingar eru gjørdar **í filtrinum við stjørnuna**:

1. Pílar til vinstru og høgru
2. Avmarkingar, hvat verður víst

**Ad 1, Pílar til vinstru og høgru**

Pílarnir gera tað lættari at "blaða" millum møguleikarnar í filtrinum við stjørnuna. Raðfylgjan er eftir kontustronginum:

- Stovnsleiðari <->
- Stovnur <->
- Stovnsnummar <->
- Høvuðsslag <->
- Standardkonta <->
- Standardroknskaparkonta <->
- Útgreining <->
- Stað <->
- Endamál <->
- [O.s.fr.] <->

Pílurin til vinstru skal eisini gera tað lættari at bakka, tá man hevur borað seg niður, tí nú er ikki neyðugt at brúka pílin í browsaranum (ovast í vinstra horni) fyri at bakka úr eini vali.

Um man hevur valt <u>kontukort</u>, kann man nú trýsta **á píl til vinstru** fyri at fara úr kontukortum aftur.

Sí **píl 1** á myndini niðanfyri, sum vísir pílarnar.

**Ad 2, Avmarkingar, hvat verður víst**

Listin er styttur til bert at vísa teir tættir, sum stovnsnummarið er bókað á. Um t.d. onki er bókað á "Endamál", verður "Endamál" ikki víst í listanum. **Sí píl 2**, har "Endamál" ikki verður víst, tí onki er bókað á "Endamál".

Tit eru vælkomin við viðmerkingum til broytingarnar.

